DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

betri pensjón

# Hálvársfrásøgn 2024

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5



DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5



# Innihaldsyvirlit


5 ára yvirlit 4

**01**
Leiðslufrágreiðing 6

**02**
Rakstrarroknskapur 9
Fíggjarstøða 11
Uppgerð av broyting í eginogn 13

**03**
Notur 14

**04**
Leiðsluátekning 17
Partafelagsupplýsingar 19

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

betri pensjón

# 5 ára yvirlit

| HØVUÐSTØL (1.000 KR.) | 1H 2024 | 1H 2023 | 1H 2022 | 1H 2021 | 1H 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 113.981 | 98.905 | 92.067 | 88.832 | 79.503 |
| Tryggingarveitingar | -36.510 | -47.037 | -27.961 | -20.084 | -21.139 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 101.482 | 48.846 | -166.765 | 73.281 | -59.708 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -8.001 | -7.756 | -7.511 | -7.294 | -6.620 |
| Úrslit av endurtrygging | -618 | -551 | -539 | -513 | -321 |
| Tryggingartekniskt úrslit | 3.775 | -1.141 | 3.979 | 6.130 | 7.410 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutr. | -660 | 24 | -986 | -653 | 1.259 |
| Ársúrslit | 2.818 | -2.551 | -3.598 | 4.026 | 4.486 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur | 2.113.363 | 1.806.289 | 1.648.428 | 1.621.421 | 1.378.607 |
| Eginogn í alt | 74.504 | 68.565 | 77.710 | 83.596 | 79.799 |
| Ognir í alt | 2.193.466 | 1.880.117 | 1.732.844 | 1.711.315 | 1.465.744 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Avkastpst. knýtt at marknaðarrentuproduktum | 5,4% | 3,3% | -9,4% | 5,3% | -4,2% |
| Váði á avkasti knýtt at marknaðarrentuproduktum [1] | 2,000 | 2,000 | 2,000 | 2,000 | 2,000 |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 371 kr. | 361 kr. | 357 kr. | 354 kr. | 343 kr. |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 0,4% | 0,4% | 0,4% | 0,5% | 0,5% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 3,8% | -3,7% | -4,6% | 4,8% | 5,6% |
| Solvensdekningur | 270% | 249% | 282% | 303% | 288% |

1) Talið vísir til váðabólk, sum greitt frá í kunngerð nr. 4 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum v.m. §101 og bilag nr. 8

# 5 ára yvirlit fyri bráðsjúkuvirksemi

| HØVUÐSTØL (1.000 KR.) | 1H 2024 | 1H 2023 | 1H 2022 | 1H 2021 | 1H 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld brutto | 4.260 | 3.902 | 3.746 | 3.457 | 3.166 |
| Bruttoskaðaendurgjøld | -4.255 | -3.422 | -4.285 | -3.689 | -1.431 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi | -666 | -456 | -446 | -422 | -476 |
| Úrslit av endurtrygging | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -660 | 24 | -986 | -653 | 1.259 |
| Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ársúrslit | -660 | 24 | -986 | -653 | 1.259 |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent | 99,9% | 87,7% | 114,4% | 106,7% | 45,2% |
| Bruttokostnaðarprosent | 15,6% | 11,7% | 11,9% | 12,2% | 15,0% |
| Combined Ratio | 115,5% | 99,4% | 126,3% | 118,9% | 60,2% |

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# Í stuttum

**Úrslit farna tíðarskeið**
**2,8 mió.kr.**

**Úrslit áðrenn skatt**
**3,4 mió.kr.**

**Tryggingartekniskt úrslit**
3,8 mió.kr.

**Grundarfæfeingi við hálvárið**
74,5 mió.kr.

**Fæfeingiskrav við hálvárið**
3,7 mió.evrur (27,6 mió.kr.)

**Roknaður solvenstørvur**
16,7 mió.kr.

**Yvirdekningur í mun til fæfeingiskrav**
46,9 mió.kr.

**Úrslit 2024 fyri skatt verður væntandi**
3-6 mió.kr.

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# 01

## Leiðslufrágreiðing

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5



## Eigaraviðurskifti

Betri Pensjón P/F er lívstryggingar- og pensjónsfelag, ið selur pensjónsloysnir til føroyska marknaðinum.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F og eigur allan partapeningin í felagnum.

## Úrslitið fyri fyrra hálvár 2024

Tryggingargjøldini, íroknað innskot, vuksu frá 98,9 mió.kr. í fyrra hálvári 2023 til 114,0 mió.kr. fyrra hálvár 2024.

Tryggingarveitingarnar vóru 36,5 mió.kr fyrra hálvár 2024 móti 47,0 mió.kr. fyrra hálvár 2023.

Avkastið fyrra hálvár 2024 var 101,5 mió.kr. móti 48,8 mió.kr. í fyrra hálvári 2023.

Rakstrarútreiðslurnar vóru 8,0 mió.kr. ímóti 7,8 mió.kr. fyrra hálvár 2023.

Rakstrarúrslitið eftir skatt gjørdist 2,8 mió.kr. móti -2,6 mió.kr. í fyrra hálvári 2023. Úrslitið fyri fyrra hálvár 2024 verður mett at vera nøktandi.

## Viðmerkingar til fíggjarstøðuna

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F hækkar frá 2.023 mió.kr. við árslok 2023 til 2.194 mió.kr. í fyrra hálvári 2024. Lívstrygg-ingaravsetingar hækkaðu frá 1.929 mió.kr. við árslok 2023 til 2.103 mió.kr. í fyrra hálvári 2024.

Eginognin tann 30. juni 2024 var 74,5 mió.kr.

## Váðar, ið kunnu ávirka úrslitið

Betri Pensjón metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava negativa ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Felagið nýtir væl skipaðar mannagongdir fyri at stýra váðunum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi, yvir-skipaðar leiðreglur, sum stjórn og leiðsla alsamt halda eyga við verða hildnar.

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirði á ognum felagsins broytast orsakað av broyttum marknaðarviðurskiftum so sum rentu, kursi v.m. Fyri Betri Pensjón er marknaðarváðin størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløguætlan fyri partabrøv. Felagið avmarkar eisini marknaðarváðan við at grunda virksemi sítt á marknaðarrentu tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan av egnum íløgum. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.

Tryggingarligu váðanir eru knýttir at gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika v.m. Hækkandi livialdur økir veitingar felagsins til eftirlønir, meðan tal av andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av tí at felagið í høvuðs-heitum hevur lagt seg eftir marknaðarrentu tryggingum, har eftir-lønin hjá kundanum er knýtt at teirri íløgustrategi, hann sjálvur hevur valt, eru tryggingarligu váðarnir avmarkaðir.

Felagið kann vera fyri fíggjarligum tapi vegna operationellan váða. Hesin kann eisini skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feil í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki.

Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funk-tiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør, fylgir fe-lagið neyvt við marknaðargongdini. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu, opinleika og gjøgnumskygni í samskift-inum við kundan.

## Kapitalur og solvensur

Eginogn felagsins tann 30. juni 2024 var 74,5 mió.kr. ímóti 71,7 mió.kr. tann 31. desember 2023.

Fæfeingiskravið var 27,6 mió.kr. tann 30. juni 2024.

Grundarfæfeingið við hálvárið 2024 var 74,5 mió.kr., og solvens-dekningur felagsins var 270 % ella 46,9 mió.kr. oman fyri fæ-feingiskravið.

## Útlit fyri 2024

Við árslok 2023 varð mett, at raksturin fyri 2024 fór at geva eitt avlop millum 3,0 mió.kr. og 6,0 mió.kr. Hildið verður fast við hesa meting.

## Serligar hendingar

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar týðandi hend-ingar farnar fram, sum ávirka metingina av hálvársfrásøgnini fyri 2024.

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# 02

## Roknskapur

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5



# Rakstrarroknskapur

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2024 | 1H 2023 |
|---|---|---|---|
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 113.981 | 98.905 |
| | Endurtryggingargjøld | -618 | -551 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **113.363** | **98.354** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 19.024 | 7.308 |
| | Virðisjavningar | 84.065 | 43.364 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -1.608 | -1.825 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **101.482** | **48.846** |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -36.510 | -47.037 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-36.510** | **-47.037** |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning** | | |
| | Broyting í lívstryggingaravsetingum | -166.238 | -95.615 |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt** | **-166.238** | **-95.615** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning** | | |
| | Útveganarkostnaður | -3.089 | -3.203 |
| | Fyristingarkostnaður | -4.912 | -4.552 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-8.001** | **-7.756** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -321 | 2.067 |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **3.775** | **-1.141** |
| | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | -660 | 24 |
| | Íløguúrslit av eginognini | 321 | -2.067 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **3.436** | **-3.184** |
| | Skattur | -619 | 632 |
| | **Úrslit** | **2.818** | **-2.551** |

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# Fíggjarstøða

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2024 | 31.12.2023 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| | **Immateriell ogn** | **3.096** | **0** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 21 | 26 |
| | **Materiell ogn í alt** | **21** | **26** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 55.047 | 53.236 |
| | Innlán í kredittfeløgum | 20.932 | 22.186 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **75.979** | **75.421** |
| | **Íløguogn í alt** | **75.979** | **75.421** |
| | **Íløguogn tengd at marknaðarrentuproduktum** | **2.103.028** | **1.929.413** |
| | **Áogn** | | |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur** | | |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 5.195 | 4.609 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt** | **5.195** | **4.609** |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | 0 | 241 |
| | Onnur áogn | 0 | 7.336 |
| | **Áogn í alt** | **5.195** | **12.186** |
| | **Onnur ogn** | | |
| | Aktuell skattaáogn | 1.250 | 1.868 |
| | Útsett skattaogn | 85 | 85 |
| | **Onnur ogn í alt** | **1.335** | **1.953** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 106 | 19 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 4.705 | 4.170 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **4.812** | **4.190** |
| | **OGN Í ALT** | **2.193.466** | **2.023.189** |

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2024 | 31.12.2023 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarstøða** | | |
| | **SKYLDUR** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 70.000 | 70.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 24.100 | 24.100 |
| | Framflutt úrslit | -19.596 | -22.414 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 0 | 0 |
| | **Eginogn í alt** | **74.504** | **71.686** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| | Lívstryggingaravsetingar | 2.112.903 | 1.946.666 |
| | Avsett til endurgjøld | 460 | 100 |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt** | **2.113.363** | **1.946.766** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við beinleiðis trygging | 1.017 | 264 |
| | Skuld til atknýtt virkir | 23 | 0 |
| | Onnur skuld | 2.579 | 2.519 |
| | **Skuld í alt** | **3.619** | **2.782** |
| | **Tíðaravmarkingar** | **1.979** | **1.955** |
| | **SKYLDUR Í ALT** | **2.193.466** | **2.023.189** |
| 1 | Nýttur roknskaparháttur | | |

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# Uppgerð av broyting í eginogn

| DKK 1.000 | Parta-peningur | Yvirkurs-grunnur | Flutt úrslit | Uppskot til vinningsbýti | Eginogn |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2023** | **70.000** | **24.100** | **-22.984** | **0** | **71.116** |
| **Rørslur á eginognini í 2023** | | | | | |
| Ársúrslit | | | 570 | | 570 |
| **Eginogn 31. desember 2023** | **70.000** | **24.100** | **-22.414** | **0** | **71.686** |
| | | | | | |
| **Eginogn 1. januar 2024** | **70.000** | **24.100** | **-22.414** | **0** | **71.686** |
| **Rørslur á eginognini í 2024** | | | | | |
| Úrslit | | | 2.818 | | 2.818 |
| **Eginogn 30. juni 2024** | **70.000** | **24.100** | **-19.596** | **0** | **74.504** |

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# 03

## Notur

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5



Nota

1 Nýttur roknskaparháttur

# Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um trygging-arvirksemi og tilhoyrandi kunngerð um ársfrásagnir hjá trygg-ingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

## Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

## Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ogn-unum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sann-líkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt, tær verða vunnar, eisini virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – herímillum tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

## Konsernviðurskifti og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

## Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyra-kursinum á umrokningardegnum.

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyra-kursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki stað-festur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

## Rakstrarúrslit

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri hálvári 2024 eftir íkast-meginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

## Lyklatøl

Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 4.

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# 04

## Átekningar

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5



# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2024 hjá Betri Pensjón P/F.

Hálvársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2024, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar 2024 - 30. juni 2024.

**Betri Pensjón P/F**

Tórshavn, hin 12. september 2024

Helgi Petersen

**Helgi L. Petersen**
Stjóri

## Nevnd

Bogi P. Nielsen

**Bogi P. Nielsen**
Formaður

**Evy J. Jacobsen**
Næstforkvinna

Jacob Eli Olsen

**Jacob Eli S. Olsen**

Petur Elias Nielsen

**Petur Elias Nielsen**

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

# Partafelagsupplýsingar

## Felagið

Betri Pensjón P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn
Tel +298 348 700
betri@pensjon.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 4627
Roknskaparár 18

## Nevnd

Bogi P. Nielsen, formaður
Evy J. Jacobsen, næstforkvinna
Petur Elias Nielsen
Jacob Eli S. Olsen

## Stjórn

Helgi L. Petersen, stjóri

## Grannskoðan

Januar løggilt grannskoðanarvirki P/F
PriceWaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
Innanhýsis grannskoðan í Betri samtakinum

DocuSign Envelope ID: 7D3FEDEE-9E99-46AF-8507-555918D57CE5

betri pensjón